


Tim Dodson, leitistjóri í Statoi. Mynd: Statoil

# Statoil útsett allar ætlanir um at bora í Barentshavinum

**Jógvan Hugo Gardar**

30.01.2015 - 15:26

Oljan.fo

Tim Dodson er leiðari fyri øllum leitivirkseminum hjá Statoil. Í samrøðu við offshoreno váttar hann at Statoil kemur at bora rímuliga nógvar brunnar á norska landgrunninum í ár, men tá spurningurin kemur til boring í Barentshavinum, tá eru boðini at har skal einki gerast fyribils.

- Vit fara at bora hampuliga nógvar brunnar, men sum støðan er í marknaðinum nú, so er rímuliga stór óvissa um hvussu allar ætlaninar fara at ganga, sigur Dodson.

Hann leggur afturat at Statoil skal bora í bæði Norðsjónum og á Norðhavinum, tað norðmenn kalla Norskehavet.

- Men vit hava í løtuni ongar ætlanir um at bora í Barentshavinum. Akkurát hvar og hvussu nógv virksemi vit skulu hava, so má eg koma aftur til tað um eina viku, tá vit leggja fram útlitini hjá okkum fyri íleggjarunum á keypsskálanum, sigur Dodson.